## Samstarv ólógligt

Kærunevndin hjá danska kappingarráðnum hevur staðfest áleggingina frá kappingarráðnum um, at samstarvið millum sjey danskar bankar steðgar. Dómurin staðfestir, at samstarvið hevði sum mál kappingaravmarking, men at tað kortini ikki var talan um beinleiðis kartelvirksemi (avtalað spæl). Hóast teir sjey bankarnir – Møns Bank, Lokalbanken i Nordsjælland, Skælskør Bank, Vordingborg Bank, Lollands Bank, Totalbanken og DiBa Bank – hava ein lutfalsliga lítlan marknaðarpart, er avtalan um at býta kundarnar ímillum sín ólóglig, slær kærunevndin fast.



## Subprime-kreppan varar leingi

Íbúðarmarknaðurin verður væntandi trupul eisini komandi seks til átjan mánaðirnar, roknar forstjórin í sveitsiska Credit Suisse, Brady Dougan við. Hann undirstrikar kortini, at bankin hevur ein sterkan likviditet og kapasitetin at vinna fyrimunir við møguligum handilsmøguleikum. Sambært Brady Dougan skapar fíggjarliga styrkin hjá bankanum góðar møguleikar á peningamarknaðinum, tí kundarnir leita eftir bankum við betri møguleika til fígging í takt við, at fígging umvegis internetbankar gerst meiri avbjóðandi.

# Flogvøllur langt burturi



*Evald Kjølbro frá Landsverk greiddi frá teknisku síðuni í framløguni*



*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, hevði boðað til kunnandi fundar um flogvallarviðurskifti í Føroyum*



*Christian Andreasen, nevnarformaður í Atlantsflog og Magni Arge, stjóri, vóru til kunnandi fundin í morgun. Fremst á myndini Alfred Olsen úr Sambandsflokkininum og uttast til høgru Bjørn Kalsø, fiskimálaráðharri. Aftast stendur Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverk*

**Upplegg til kjak, segði landsstýrismaðurin í Vinnumálum um framløguna hjá Landsverk. Valflesk, førdi andstøðan fram**

FLOGVALLIR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*myndir: Jens Kr. Vang*

Bjarni Djurholm hevði í morgun bjóðað inn til kunnandi fund, har Landsverk kunnaði um gongdina higartil í kanningunum um í fyrsta lagi útbygging av flogvøllinum í Vágum og í øðrum lagi einum alternativum flogvølli aðrastaðni í landinum.

Útbyggingin av flogvøllinum í Vágum er longu samtykt í Fíggjarnevndini, og er her talan um eina útbygging, sum fer at kosta mettar 365 milliónir krónur. Sambært Landsverk er frægasta loysnin fyri pengarnar at økja verandi vøll til 1600 metrar.

Umframt sjálva leingingina av vøllinum verður eisini neyðugt at flyta og umbyggja verandi terminal, so hann lýkur altjóða treytir. Eisini verður neyðugt at víðka um trygdarøkið við síðuna av sjálvari flogbreytini, umframt at trygdarøkir sku.lu gerast hvørju megin endarnar á breytini.

Eisini hevur verið kannað eftir í eina tíð, hvar ein møguligur alternativur flogvøllur kann leggjast í landinum. Og í seinastuni hevur mest verið tosað um Glyvursnes og Søltuvík, og skitsur eru gjørdar av hesum økjum. Fleiri alternativar breytir eru skitseraðar á Glyvursnesi, men deils verður talan um dýrar loysnir, og deils fer ein flogvøllur har at liggja rættiliga høgt.

Eitt annað alternativ er eisini nevnt, men sambært Landsverk meta ráðgevararnir ikki til at Skorðhædd er rætta staðið at leggja ein flogvøll.

### Valflesk

Tað var Evald Kjølbro frá Landsverk, sum greiddi frá teknisku lutunum í uppskotunum. Hann legði dent á, at talan er um eina longri prosess, tá umrædur alternativar flogvallir, og at tað í hvussu er verður talan um 3-4 ár frá tí, at ein møgulig avgerð er tikin um, hvar ein slíkur møguligur flogvøllur skal liggja.

Men skjøtil er settur á málið, tí byrjað var í smáum í 2005. Regluligar vind- og veðurmátingar verða gjørdar á Glyvursnesi og í Søltuvík, men enn er ov tíðliga at siga nakað um hesi hagtøl.

Eftir framløguna hjá Landsverk var høvið hjá áhoyrarunum, sum umframt nøkur fjølmiðlaumboð taldi stjóran og nevndarformannin hjá Atlantsflog, at seta fram spurningar. Eysturoyartingmenn spurdu mest um alternativið í Eysturoynni, sum eftir øllum at døma er strikað, og vágatingmenn spurdu mest um flogvøllin í Vágum. Men aðrir, og serliga Høgni Hoydal og Torbjørn Jacobsen, skýrdu framløguna fyri valflesk, og seinni nevndi hevði enntá hug at leggja Landsverk undir at hava skotið valstríðið hjá Fólkaflokkinum í gongd.

Aðrir róðu meiri upp undir at viðgera spurningarnar, men nógv mettu timingina vera suspekta. Men nú er so hol sett á kjakið aftur um alternativan flogvøll – nakað, sum eisini sæst aftur í Sosialinum í dag.